Lagt til rættis: E yðun Klakkstein

Í stuttum

# Minogue rundar 40





Australska poppdrotningin Kylie Minogue fyllir 40 ár í dag. Kylie Minogue er best kend sum songkvinna, men hon byrjaði sína yrkisleið sum sjónleikari. Skjótt var tað tónleikurin, sum fylti meira, og hon er saman við Madonnu einasta kvinna, sum hevur verið ovast á hitlistum í 80'unum, 90'unum og í hesari øldini. Kylie Minogue hevur givið 10 studiofløgur út. Fyri nøkrum árum síðani stríddist hon við krabbamein, men síðani hevur havt gjørt comeback við nýggjum tónleiki og konsertferð.

# The Boss í toppformi



Bruce Springsteen er væl fyri, nú hann er farin á konsertferð í Europa. Ummælarin hjá BT, Steffen Jungersen, hevur verið til konsert hjá Springsteen í Dublin, og hann kvitterar við 6 stjørnum til The Boss.

- Kongurin er komin aftur, skrivar Jungersen í sínum ummæli.

Eisini írsku ummælini av somu konsert hálova amerikanska rocksangaranum.

# Dirty Harry pensióneraður



Seinastu tíðina hava filmshetjur sum Rambo, Rocky og seinast Indiana Jones gjørt comeback á hvíta tjaldinum. Men tey, sum kundu hugsað sær ein nýggjan film við Dirty Harry, fáa ongan slíkan film. 78 ára gamli Clint Eastwood, sum hevði leiklutin sum Dirty Harry fimm filmum um harða løgregulmannin, segði við fjølmiðlarnar til filmsstevnuna í Cannes herfyri, at tað kemur ikki upp á tal at gera ein nýggja Dirty Harry-film. Seinasti filmurin um Dirty Harry er frá 1988.

# McCartney heiðraður



Popptónleikarin Sir Paul McCartney hevur nú fingið ein nýggjan heiður. Hann er nevniliga gjørdur til heiðursdoktara á virda Yale universitetinum í USA. Hetta hendi sunnukvøldið, tá ið Yale helt sín 307 ára føðingardag.

- Vit eru hugtikin av tínum musikalsku evnum og vælgerandi arbeiði, segði rektarin Richard Levin til hátíðarhaldið, har McCartney takkaði fyri og spældi sangin Hey Jude saman við einum bólki.

# Sløsaði við loyniligum skjølum



Kanadiski uttanríkisráðharrin Maxime Bernier er farin úr sínum starvi, tí hann hevur sløsað við loyniligum skjølum.

- Hann hevur latið loynilig skjøl liggja frammi á einum ótryggum stað, og tað er ein álvarsamt mistak, sigur forsætisráðharrin, Stephen Harper. Uttanríkisráðharrin hevur verið undir stórum trýsti, síðani tað kom fram, at ein av hansara fyrrverandi unnustum hevur hvat tilknýti til Hells Angels umhvørvi. Tá ið hendan kvinnan so eisini vísti á, at uttanríkisráðharrin hevði sløsað við loyniligum skjølum, fór Harper úr starvinum.